


*Tað er ikki hissini bókaverk, ið Petur Jacob Sigvardsen hevur latið úr hondum. Bara søgan um heimbygd hansara, Gjógv, telur fýra bind og fevnir um 1328 síður. – Eg havi longu skrivað 120 síður í teirri fimtu og seinastu bókini. Henda setir spurningin: Hví ið heimbygd mín fúnaði burtur, sigur 78 ára gamli rithøvundurin*

ringunum, og tú tevjaði royk av nýbakaðum breyði. – Tað vóru løtur, tú ongantíð gloymir!

– Her varð eisini tosað um, hvat bátarnir høvdu fingið; hvussu nógv kúgvin hevði mjólkað; hvat dagsarbeiðið hevði verið og onnur daglig viðurskifti. Her varð alt bygdarlívið – øll arbeiðsmentanin á landi og sjógv havd til umrøðu, greiðir Petur Jacob frá.

Undir hesum mannborna vísdóminum sat tann lítli og hugagóði unglingin og lýddi á. Hetta hevði kveikt áhuga hansara almikið, ja, meiri enn tað: Hann var evnagóður, hevði gott minni og fór so smátt at skriva alt hetta niður, – fyrst á smærri lepar, men seinni í tjúkka bygdarsøgu í 4 bindum á 1328 síðum.

Tað var tó ikki bert heima við hús, at fólk soleiðis komu saman. Handlarnir tá í tíðini í bygdini vóru sannir mentanarberar, tí eisini har komu fólk, helst eldri menn, saman at tosa.

## Eldorado

Ymiskt var sjálvandi, hvussu menn dugdu at práta og gera burturúr. Har sótu álvarsamir og fámæltir menn, ið næstan ikki gloppaðu munnin, men sótu bert og lýddu á.

So vóru tað aðrir, ið høvdu góðan hug at práta. Men tú gavst tær far um, at tað valdaðist, hvat ið prátað varð um.

– Summum dámdi væl at tosa um seyð, neyt, eplagrøði, hoygging og tílíkt. Øðrum dámdi betur at tosa um útróður og bjargaferðir. Tað barst tær fyri, at har sótu skilamenn hvør á sínum øki og greiddu frá, og at allir hinir, ið hetta vistu og viðurkendu, sótu líkasum bert og lýddu á og samtyktu tigandi, sigur Petur Jacob.

Handlarnir lótu seint aftur, og onkuntíð gekk prátið so lystiliga til fram ímóti midnátt. Tað var ikki hissini, sum ein fekk at vita har.

Páparnir tá á døgum vóru hálvt árið á sjónum; men Petur Jacob, hann var so heppin at eiga eina mammu, ið var ófør at siga frá, og ein abba, sum var sannur barnavinur. Hann tók seg við sær bæði til fjals, fjøru og at dyrgja, og allastaðni royndi hann at læra seg alt tað, ið har var at síggja í bø og haga, fram við landi og ikki minst um Búgvan, har hann var so kunnigur sum fáur.

– So tú skilir, at Gjógv var eitt satt eldorado hjá okkum børnum. Ja, bygdin og øll tann fríða náttúran var sum ein ovurstórur leikvøllur, greiðir Petur Jacob íðin frá.

Á barnaárum hansara vóru haraftrat nógv fólk í bygdini - 283 í tali, og ikki færri enn 53 skúlabørn.

**Gjógv var eitt satt eldorado hjá okkum børnum. Ja, bygdin og øll tann fríða náttúran var sum ein ovurstórur leikvøllur**

## Fjarstaddur

Tíðin við Gjógv fekk tó ein bráðan enda, tí longu sum 14 ára gamal fór Petur Jacob til Havnar. Men hóast fjarstøðuna gloymdi hann tó als ikki heimbygd sína.

– Tað var líkasum, at tá fekk at síggja bygdina við øðrum eygum, og eg fekk eina sjónskari mynd av henni. Ja, sjálvt um eg var fjarstaddur, so var eg kortini í huganum helst nógv nærri bygdini enn bygdarfólkið tey árini, eg skrivaði Gjáar-søgu, greiðir hann frá.

Við sær í viðføringum út í ta stóru verð kann ein siga, hevði hann ein hóp av lyklaorðum frá barnaárum sínum, og áhugan fyri tí fjølbroytta bygdarlívinum varðveitti hann væl og virðiliga í starvi sínum innan skúlans gátt og fyrisiting restina av lívinum.

Tað skuldu tó ganga mong ár, áðrenn fólk skuldu fáa kunnleikan um – og ikki minst gleðina av – hesum stóra ríkidøminum um eina farna tíð á bygd, sum hann nú hevði fest á blað. Tí longu á ungum árum týddi Petur Jacob fleiri bøkur.

At Petur Jacob hevur góðar gávur at málbera seg skrivliga, kom eisini til sjóndar fyrst í 80'unum, tá ið hann vann 1. virðisløn í eini kapping hjá Fróðskaparsetrinum um torv og torvarbeiði. Tað var tó kortini ikki fyrr enn í 1997, tá ið hann fór úr starvi í Landsskúlafyrisitingini, at hann av álvara fór at skriva.

At hann síðani ikki fekk afturhald, hava mong fólk kunnað glett seg um í stóru bókaverkum hansara um bygdarlívið, torvarbeiðið og sjáldsamar hendingar hesi seinastu 10 árini. Tá eru ikki allir teir hundraðtals sálmarnir og sangirnir taldir við, sum hann eisini hevur latið úr hondum í sínum langa lívi.

## Full vissa

Tað man kortini vera stóra, áhugaverda og rúgvismikla verk hansara um heimbygdina, sum á mangan hátt hevur skapt fyridømi fyri tílíkar bygdarsøgur.

Sum nevnt omanfyri, hevur Petur Jacob valt eina aðra leið í hesum verkum sínum. Men størsta ynski hansara er at lýsa kærleika sín og vísa áhuga fyri bygdini og fólkinum, sum har hevur búð og framvegis býr.

*Framhald á næstu síðu*

Føroyaprent plantar trø